HVUSSU SKIPA VIÐ REHABILITERING Í FØROYUM?
*- gev borgarunum megi og mót aftur*







# FRAMLØGA AV LÓGARUPPSKOTUM

## FORMLIGIR OG POLITISKIR KARMAR

## - Strategiskar ætlanir á rehabiliteringsøkinum

FRAMLEGGJARI: RÓSA SAMUELSEN
TÓRSHAVN TANN 25. OKTOBER 2018
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# FRAMLØGUR AV LÓGARUPPSKOTUM

- Broytingar í sjúkrahúslógini um samskipara og hugtakið rehabilitering - bráðfeingis tørvurin at seta samskipara
- Løgtingssamtykt um, at gera eina menningarætlan fyri rehabilitering í Føroyum umframt eina rehabilitertingslóg - meira langtsiktaðar broytingar, ein idealstøða

REHABILITERING SNÝR SEG UM VIÐGERÐ Í LONGRI TÍÐARSKEIÐ




© RS 2018

# BROYTINGAR Í LÓGTINGSLÓGINI

# UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ



# LØGTINGSLÓG UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Bakgrund**

- Loysa bráðfeingis trupulleikar, sum eru á rehabiliteringsøkinum og at seta ein heilsufakligan samskipara
- Tríggjar lógir, sum heimila endurvenjing, t.e. lógin um sjúkrahúsverkið, lógin um heimatænastu og eldrarøkt og forsorgarlógin
- Kunngerðir - fleiri tænastur, sum enn ikki verða veittar borgaranum
- Rehablitering byggir á ta fortreyt, at talan er um viðgerð í longri tíðarskeið
- Sjúkralegur í styttri tíðarskeið krevja ikki tað sama av avvarðandi, arbeiðsbyrða og familjulív - læknafaklig meting




© RS 2018

# LØGTINGSLÓG UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Bakgrund** ....framhald

- Oftast tey avvarðandi, makin, foreldur, børn ella systkin, sum hava samskipandi leiklutin og uppgávuna fyri sjúklingin
- Áðrenn sjúklingurin verður útskrivaður av sjúkrahúsi er neyðugt at gera klárt heima
- Avvarðandi nógvar uppgávur í einari familju, talan kan verða um barnafamiljur, ella eina vanliga familju, har børn, familjan, arbeiði, hús og heim eisini skulu røkjast
- Fíggjarliga koma familjur oftani í óføri - er ein av forsyrgjarunum raktur, so eru fylgjurnar, at inntøkan minkar munandi




© RS 2018

# LØGTINGSLÓG UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Bakgrund** ....framhald

- Royndir eru frá okkara grannalondum - lættir nógv um, at sjúklingurin og teirra avvarð-andi fáa ein samskipara, sum tekur sær av og hevur ábyrgdina av  teimum fakligu uppgávunum og innsatsinum
- Í okkara grannlondum, at dentur verður lagdur á rehabiliteringsútbúgvingar fyri at fáa best møguligt innihald og eisini, at settar verður á stovn læknaligar sergreinar innan rehabilitering
- Uppskotið leggur upp til at loysa bráðfeingis trupulleikar - at seta ein heilsufakligan samskipara. Tí setast í verk 1. januar 2019
- Leikluturin hjá samskiparanum má vera óheftur av tí skipanini, sum veitir tænastuna




© RS 2018

# LØGTINGSLÓG UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Endamál**

- Lógarfesta rættin til rehabilitering í breiðari merking innan fyri sjúkrahúsverkið (endur-menning og endurvenjing, likamliga, sálarliga og sosialt)
- Virka fyri, at virkisførleikin hjá einum sjúkuraktum verður soleiðis, at hesin aftur kann fáa eitt sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív, sum tekur støðið í gerandisdegnum
- Seta á stovn eina samskipaða tvørfakliga heildartænastu til kropsliga, sálarliga og sosiala viðgerð
- Borgarin fær eina samskipara, sum ráðgevur, vegleiðir og í heila taki samskipar og stendur fyri, at allar neyðugar fakligar tænastur og uppgávur verða veittar



# LØGTINGSLÓG UM SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Endamál** ....framhald

- Knýta arbeiðið at gera eina rehabiliteringsætlan og ein samskipara, sum fær ábyrgdina av, saman við læknunum, heilsustarvsfólkunum (terpeutar o.o.), sjúklinginum og teimum avvarðandi, at fremja tað, sum stendur í ætlanini
- Ein rehabiliteringsætlan, sum fevnir um alla heilsustøðuna hjá sjúklingum
- Tryggja, at tann sjúkuraktið og/ ella tey avvarðandi ikki fáa truplu og tungu uppgávuna at samskipa allar tær tænastur, sum skulu veitast
- Tryggja, at orka og fígging verður sett av til endamálið




© RS 2018

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# LEIKLUTURIN HJÁ SAMSKIPARA - framyvir

## Víðkað lógarfest starvsøkið á rehabiliteringsøkinum

**Uppgávur hjá samskipara**
- Fevna um bæði reyða og bláa feltið
- “Dirigentur” - fyrireiking heimkoma
- Vegleiðing og ráðgeving, tryggja at fakligar tænastur verða veittar
- Tryggja tvørfakliga samskipan
- Tryggja heildartænastu
- Uppfylging av rehabiliteringsætlan
- Netverksfundir




Samskipan




Heildartænasta fyri rehabilitering - tað heila menniskja



Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# LØGTINGSSAMTYKT

# UM MENNINGARÆTLAN OG REHABILITERINGSLÓG

# - til aðalorðaskifti




© RS 2018

# LØGTINGSSAMTYKT UM MENNINGARÆTLAN O.A.

**Bakgrund**

- Gera eina menningarætlan og rehabiliteringslóg
- Rehabilitering í Føroyum virkar ikki sum ein samanhangandi tvørfaklig skipan, har rættindi og skyldir hjá borgarunum eru tryggjaði at kunna virka aftur í gerandisdegnum
- Skipanin er í løtuni petta sundur í ymiskar skipanir og tí ikki gjørligt at gera fullfíggjaðar rehabiliteringsætlanir
- Avleiðingin er, at borgarar, sum gerast álvarsliga sjúkir detta niðurímillum - fáa ikki nøktandi samskipandi tænastur




© RS 2018

# LØGTINGSSAMTYKT UM MENNINGARÆTLAN O.A.

**Bakgrund**

- Tá sjúklingurin skal heim av sjúkrahúsinum er felags fyri nærum øll tey avvarðandi, at tað knappliga eru tey, sum hava ella fáa "ábyrgdina" av at fáa alt at hanga saman
- Tørvur á politiskum málsetningum og raðfestingum - tryggja óhjálpnum, veikum og teirra avvarðandi eina skipaða rehabilitering
- Ein lógarfestur rættur
- Neyðugt skulu vit framhaldandi kalla okkum eitt vælferðarsamfelag, har øll skulu hava tað gott og kunnu trívast




© RS 2018

# LØGTINGSSAMTYKT UM MENNINGARÆTLAN O.A.

**Endamál**

- Menningarætlan um, hvussu vit skipa rehabilitering í Føroyum
- Viðkomandi fakbólkar, áhugabólkar, politiskur fylgibólkur o.o.
- Rehabiliteringslóg
- Menningarætlan og lógaruppskot lagt fyri Tingið til aðalorðaskifti
- Lyfta rehabilitering í Føroyum á eitt altjóða og samfelagsliga kappingarført vælferðarstøði




© RS 2018

# REHABILITERINGSLÓG - framtíðin

## Nýggjur lógarbygnaður og regulverk á rehabiliteringsøkinum

Orðing av rehabiliteringspolitikki







Heildartænasta fyri rehabilitering




© RS 2018

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# VÍÐARI POLITISKA ARBEIÐIÐ

- Bæði lógaruppskotini eru løgd fyri Tingið í dag
- Fakligt og politiskt íkast á hesum fundinum til víðari politisku viðgerðina
- Vóna eina breiða politiska undirtøku í Tinginum
- Síðan aðalorðaskifti
- Heilsufakligur samskipari bráðneyðugt - tí ein skjót lógarbroyting og játtan
- Málið er ein idealskipan við einari rehabiliteringslóg og fleiri pengum til endamálið

Framløgur og lógaruppskot
verður lagt á heimasíðuna hjá Sambandsflokkinum komandi dagarnar
www.samband.fo



# TAKK




© RS 2018